**Fundarfrágreiðing frá lestrarráðsfundi 20.10.17**

**Á fundi:** Erika Anne Hayfield, lektari, forkvinna
Ingmar Berg Mikkelsen, lesandi, næstformaður
Jens Christian S. Justinussen, útbúgvingarleiðari
Bárður Larsen, útbúgvingarleiðari
Ingi Jacobsen, lesandi
Emil Hermansen, lesandi
Sigrid Joensen, skrivari

1. **Broytingar í lestrarráðnum:**
Ingmar B. Mikkelsen er næstformaður í Lestrarráðnum. Erika sendir broytingarnar í viðtøkunum til øll í Lestrarráðnum. Uppskot til møguliga broytingar skulu sendast til Eriku í einasta lagi mánadagin 23. okt.

2. **Góðskrivingar:**
***N.N. lesur Sosialvísindi:*** Umsókn um góðskriving fyri Ritgerð (verkætlan) 10 ECTS. Treyta av at Tróndur útvegar skjøl, sum formliga vátta, at hann hevur staðið Basisprojekt 3.

***N.N. lesur búskaparfrøði:*** Umsókn um góðskriving fyri Virkisstýring 7,5 ECTS. Treytað av at vit móttaka eitt prógv sum er lesiligt.

***N.N. lesur Løgfrøði:*** Umsókn um góðskriving, hevur fingið góðskrivað 10 ECTS fyri skeiðið Skattarættur.

***N.N. lesur búskaparfrøði:*** Umsókn um góðskriving. Hevur fingið góðskrivað 7,5 ECTS fyri skeiðið Altjóða marknaðarføring.

***N.N. lesur Sosialvísindi:*** Umsóknir um góðskrivingar:
1. Hevur fingið 10 ECTS fyri Ritgerð I.
2. Hevur fingið 10 ECTS Valfag 1, fyri (Sosialpsykologi, teori og metode)
3. Umsókn um góðskriving fyri Samfelagsástøði. Ikki gingin á møti, men kann søkja av nýggjum at fáa góðkent sum valfak I
4. Umsókn um góðskriving fyri sosiologi og mentan er ikki gingin á møti. Men kann søkja um at fáa Psychology of social life og Historie og Kultur góðskrivað fyri Valfak 2, 10 ECTS.
5. Umsókn um góðskriving fyri Ritgerð 2, verður ikki gingin á møti.

3. **Skeiðslýsingar:**
***2475.15 Metoda, Masterlæra:*** Broyta Metodologi til 10 ECTS. Lestrarráðið mælir til at broyta heitið til Háttalagsfrøði.
LR mælir til at broyta Masterlæruna til "Masterlæruprosjekt"

***2824.17 Háttalag I:*** Kanna um skeiðsnummarið er rætt. Heitið á skeiðslýsingini á Moodle skal verða Háttalag I. Próvtøkuháttur og próvtalsstigi er broyttur og góðkendur. JCS sendir Sigrid viðmerkingar til skeiðslýsingina.

4. **Undirvísing í kelduávísingum:**
   Lestrarráðið hevur viðgjørt punkt nr. 4 og metir at hetta er nakað sum tey lesandi eiga at læra ígjøgnum skeiðini, sum tey hava, tó so kann meira áherðsla leggjast á kelduávísingum í ávikavist Ritgerð I, Ritgerð 2 og Ba, seminar. Harumframt skal EAH venda sær til leiðsluna, um at fáa eina undirsíðu á setur.fo við tilfeingi um kelduávísingar.

5. **Annað:**
   EAH kannar møguleikan at fáa eina mappu á Moodle. Ynskja okkum forum til skjøl, lættari at fáa greiðu á skjølunum frá Eriku til LR fundir.